Várvindar

Bergtóra Hanusardóttir

Halla ripaði hurðina aftur, so húsini skulvu. Endiliga var hon inni hjá sær sjálvari. Um at kvalast. Gekk tey tvey fetini móti vindeyganum, vendi og gekk tey trý aftur móti dragukistini og speglinum. Henni dámdi tó onki at síggja tað logandi, illsinta andlitið og vendi aftur móti vindeyganum. Og fyri tí stóð hon eina løtu og hugdi út, meðan hon andaði seg a tremur nakrar ferðir. For ólukkan, so snarsint hon altíð var. Hvussu skuldi nakrantíð verða fólk burtur úr henni, tá hon onki toldi av? Hon suffaði. Og so komu tárini spakuliga aftaná, sum tey vóru von.

Men nú leið móti endanum á skúlatíðini, og tá ætlaði hon sær at fara. Tað gjørdist ikki annað. Her var ikki rúm fyri øllum. Hvørki innan ella uttan veggja. Sálin var so ófriðarlig, so ótolin og tykkin. Vildi sleppa út og burtur, men eisini uggast.

Tíbetur vóru ráð fyri tí. Janus bíðaði í útlondum, og skjótt skuldu tey vera í friði har. Ótarnað og fræls fóru tey at liva og at verða eydnurík. Halla hugdi við fjarum og droymandi eygum at skýferðini. Jú, burturi fór at vera betri; har fór alt at bera til.

Uggað dróg hon skrivarborðsskuffuna eftir tí seinasta brævinum frá Janusi. Tað var bæði tjúkt og tungt, og hon trýsti tað inn at sær. Beint nú vóru tað tey heilt ávísu pettini, henni longdist eftir at lesa. Pettini, har hann segði henni, hvussu honum longdist, hvussu góður hann var við hana, og hvussu ringt tað var at bíða. Og hon legði seg á songina við brævinum:

... nú fari eg at ynskja tær alt tað besta, góða, og góða nátt. Eg eri heilt vísur í, at eg fari at droyma um teg. Tað hevur ikki verið ein nátt enn, at eg ikki havi droymt teg. So tú skilir, at eg veit hvat eg tosi um, tá eg sigi at mær leingist eftir tær. Viðhvørt leingist mær

so illa, at eg kenni mestsum rættiliga pínu. Eg elski teg! Eg hevði viljað, at eg kundi mussa teg beint nú. Men hvat skal eg gera? Eg má skunda mær at sovna, tí so síggi eg teg aftur, hóast tað ikki er tað sama. Góða nátt, góða!

tín Janus

Halla lat seg føra við orðunum, lat tey søkka inn á botn, og sá Janus fyri sær, sum tá hann var bestur við hana. Royndi sum longst at sleppa sær undan fyrra helmingi av brævinum, tí sum órógvaði hana:

24. mars... hetta er seinasti dagur, tú ert 17 ár. Eg elski teg!

og 25. mars... Tillukku góða, eg havi roynt at skriva til klokkan eitt. Hvussu kennir tú teg nú? Nógv eldri? Í hesi nátt ert tú giftingarfør, minst til tað! Eg ringi í annaðkvøld...

Og hann hevði ringt, og tey vóru komin til ilnar. Fyri at siga sum var, so hevði hann púra spilt henni føðingardagin, og hon var framvegis sum ein fangaður útiløgukattur. Hann mundi kortini ikki hava meint tað í álvara; hon mátti fáa hann at skilja, at tað bar ikki til; tey kundu elska hvørt annað uttan at vera gift; tað høvdu tey gjørt higartil. Hon hevði hoyrt, at hann hevði drukkið; tað mundi vera tað, sum bagdi; og longsul kanska eisini. Uppaftur verri at vera einsamallur burturi, enn at vera einsamøll heima. Sum hon saknaði hann: tryggleikan, nærleikan, at vera elskað, kroyst, kitlað, lyft, snurlað og mussað, at tosa og spyrja, at siga frá loyndarmálum, at droyma, ferðast og eisini at hoyra til hjá fremmandum, at vera forelskað. Hví so himprast? Hevði hann rætt í, at hon ongantíð fór longur, enn at hon altíð kundi venda aftur? Elskaði hon hann kortini ikki av heilum huga? Okkurt forðaði henni. Giftast, nei, tað kendist so syrgiligt at giftast. So endaligt. Onkursvegna mátti hon bjarga tí góða. Hevði droymt um at leita eftir sær sjálvari burturi, úti í stóru verð, har ongin kendi hana, har ongin kundi stýra henni. Og hon gleddi seg til at hava Janus við á ferðini, kundi ikki vera hann fyri uttan. Spell, at hann skuldi hava fingið hesa hugmyndina.

Halla reistist, fór niður av loftinum, tók jakkan og slepti sær útum. Tað var turt og myrkt, men nógvur vindur.

Hon gekk skjótt og leitaði sær leiðir, har onki fólk var. Hárið slongdist um høvdið, og jakkin fyltist og tømdist, meðan ófriðurin so líðandi makaði. Jú, tað mátti borið til at fingið tað soleiðis, at bæði Janus og hon kundu liva eydnuríkt og gevandi. Og í tí treysti vendi hon og gekk spakuliga aftur at húsum.

„Hví kanst tú ikki vera kona mín nu? Eg vil liva eitt vanligt lív sum øll onnur. Eg havi rætt til tað. Hví sigur tú altíð bíða? Hvørjum skal eg bíða eftir? Tær ella enn longri bíðan? Hvat er tað, sum ikki fer at batna, um vit vera gift? Alt verður betri! Um tú nevnir ein og hvønn drankara, sum tekur eitt glas av og á, so fari eg altíð at vera drankari. Tað verður bara meiri her, tí her er onki rættiligt at gera. Tað er tað, sum bagir. Eg treingi til stuðul frá tær alla tíðina, og hvussu skal eg fáa hann, um vit ikki eru gift og kunnu vera saman altíð? At gifta seg er ein kærleiksváttan. Hví kanst tú ikki geva mær so mikið? Eg vil hava eina konu! Eg skuldi havt gjørt teg upp á vegin fyri langari tíð síðani!“ Janus leyp á dyr, og Halla rann aftan á honum: „Ikki fara, kom aftur!“ Hon fekk í troyggjuna, men hann skrykti seg leysan, rann oman gjøgnum trappurnar, og so hoyrdi hon úthurðina bresta í lás.

Hví skuldi tað altíð enda soleiðis? Hví skuldi hann rýma, bara tí tey ikki vóru samd? Hví skuldi hann gera tað, sum sáraði hana mest, sum gjørdi ringast fortreð? Hvar skuldi hon fara? Tordi ikki út at vála einsamøll í myrkrinum her. Orkaði ikki at sita inni í hesi lítlu, trongu íbúðini. Hevði ongar vinkonur at fara til. Tær høvdu sítt og búðu so langt burturi. Nú var eisini alt ov seint, tí allar skuldu tíðliga upp. Vónloysisøðin vaks í Hallu, so hon var um at bresta. Ringja heim, skriva bræv – onki var nóg mikið. Og brádliga hevði hon tikið tað fyrsta tað besta, ein urtapott, sum hon var góð við, og hevði grýtt hann av dýrastu makt í gólvið. Og so stóð hon har, stórgrátandi. Potturin í sori, skørðini niðurborað í bleyta gólvviðin, og mold slødd um alla stovuna. Á neyðardýrið! Halla tók plantuna, pilkaði ein brotnan legg og nøkur bløð av henni og trýsti røturnar eitt sindur samanaftur. Tú kanst í hvussu so er onki gera við tað! Og hon fann henni eina krukku.

Feigaði mold og skørð saman og setti sum frá leið eisini ketilin útá.

Hon visti so dánt, hvar Janus var farin. Inn til onkran av vinmonnunum og so í býin. Mynstrið var lagt, áðrenn hon kom uppí, og ikki var óhugsandi, at nógv av illstøðuni teirra millum júst gav Janusi høvi til at sleppa sær av stað, uttan at hon kom við. Hon skilti ikki hasa medferðina bara at rýma og lata hana sita eftir sum við ongum, púra ørkymlað.

Her gekst heldur onki, sum hon hevði væntað. Skúlin var so vinaleysur, býurin so stórur og líkasælur, fólkini fátæk og forfallin, vindurin lúrin, støvutur og bítandi, Janus so órímiligur og hon so einsamøll. Aftur runnu vónloysistárini eftir kjálkunum, og hon snýsti. Hetta fór ikki at bera til, hon mátti finna upp á okkurt.

Eina løtu stóð Halla við brævinum. Hevði hug at skræða tað upp, tí kanska var svarið játtandi, men aftraði seg so, tí kanska var tað nei? Umsíðir skar hon kortini bjálvan bæði væl og virðiliga við felliknívinum og las, umaftur og umaftur, til hon at enda skilti og var púra vís í, at hon var innsloppin. At hon kundi flyta inn um stutta tíð. At hon var bjargað!

Ongantíð, sum hon mintist, hevði hon havt tað verri enn hesar vetrarmánaðirnar. Hevði aftrat øllum hildið, at hon var við barn. Onki kærkomið blóð í langar tíðir. Hevði lovað olmussu, um hon slapp undan. Hevði kýstað dovnar kettur úr barnavognum í bakgarðinum. Hevði hugsað um barnaárini heima. Hevði kent, hvussu litføgur og dýrabar tey gjørdust henni í mun til alt tað gráa, svarta og skitna, sum her stóð í boði. Og at enda var hon í sínari neyð farin til læknan, sum hevði verið so ómetaliga klók og fitt at tosa við, og sum hevði givið henni tablettir at fáa lag á aftur bløðingarnar.

Men Janus hugsaði øðrvísi. „Kann nakað metast við at bera lív? Er nakað fittari enn eitt smábarn? Eg eri vísur í, at tú klárar skúlan eisini. Og hvat so um tað kemur steðgur í eina tíð? Tú verður ein deilig mamma, góða, og onkusvegna fara vit at klára okkum. Mítt skal ikki liggja eftir."

Halla leyp móti Janusi, tá hann kom. „Hygg, eg eri sloppin á kollegium. Hygg, les sjálvur! Fyrst var eg ikki upp á vegin kortini, og nú sleppi

eg úr hesum ræðuliga einseminum. Har er felags køkur, ljóst, og tað slepst allan vegin rundan um húsini. Hvat dámar tær?" Janus stirðnaði í andlitinum. „Hevur tú søkt kollegiekamar og onki sagt fyri mær? Hví tað, er her ikki nóg gott hjá tær at búgva? Her kunnu vit vera saman, uttan at nakar letur við seg koma. Men á einum kollegium, har fært tú nógvar at sita saman við í køkinum. Tað man vera tað, tú vilt, tað passar akkurát fyri teg!" Gleðin fánaði eisini úr andlitinum á Hallu, og hon kendi sinnið orna í sær. „Altíð skalt tú spilla mær gleðina. Altíð skalt tú venda øllum soleiðis, sum tað hugar tær best. Eg trúgvi ikki, at tú ert góður við meg. Tú hugsar bara um teg sjálvan!" „Nei, hin gamla, tað er tú, sum bara hugsar um teg sjálva; tú, sum ikki hevur skil fyri, hvat tað er at liva; tú, sum drepur kærleikan okkara millum. Og tað skalt tú eisini sleppa, tað finnast tíbetur gentur, sum duga betur enn tú. Farvæl!"

Hesa ferð fór hann, uttan at hon helt honum aftur. Og tá hon hevði hoyrt úthurðina klamsað, fór hon hugsunarsom og troytt innaftur og setti seg. Kundi hon vera hann fyri uttan? Hví var hann so løgin blivin, hennara Janus? Hví var tað ikki longur nóg mikið, at tey vóru góð? Hví hevði hetta við gifting og barni sovorðnan skund? Ongin orsøk var til avindsjúku. Visti hann ikki, hvussu bundin hon var av øllum tí um ikki at gera hvørjum øðrum fortreð? Men tað fór at vera harvið. Hon skuldi eisini liva. Og hví skuldi hann ikki kunna vera í kollegiekøkinum tað sama sum hon, tá hann var drongur hennara? Sovorðið humbukk!

Um midnátt vaknaði Halla av, at úthurðin var latin upp, men kom at hanga á trygdarketuni. Tað var Janus, sum kom aftur – við stívari kenning. Hon var eitt sindur bilsin – og vónrík –, tí han var ikki vanur at koma aftur av sær sjálvum aftan á rokskilnað. Tað plagdi at vera hon, sum ringdi til hansara at blíðka hann aftur. Men skjótt sá hon, at hann var als ikki bliðkaður, hann var tvørturímóti samanbitin í andlitinum, og hann skumpaði hana til viks og fór beint uttar í køkin. Har skræddi han harðliga í grýtulappaknakarnar og tók síðani pannuna og dukaði hana í skilaveggin, tey fyri stuttum høvdu smíðað og

málað. „Hvat gert tú, hvat í verðini hugsar tú fyri tær," rópti Halla og royndi at halda arminum aftur. „Slepp tær burtur ella slái eg teg eisini!" Men Halla hekk í arminum, og andlit hennara var líka illa tíggjað sum køkurin, tá Janus var farin. Hon græt og rópti í neyðini, so einsamøll, sum hon onga hóming hevði havt av, at tað bar til at vera. Men ongin kom at ugga, og ongin lætti var at fáa. Hvørja ferð hon ivaðist, um hetta veruliga var hent, rørdi hon spakuliga bólgnaða vangan ella fór uttar í køkin, – og so skolaði tregin inn yvir hana aftur. Var tað veruliga so ringt, tað hon hevði gjørt? Var hon kanska bæði tápulig og sjálvsøkin, tá hon ikki hevði skilt álvaran fyrr?

Tónleikurin var eitt sindur skrenjandi, men hóskaði væl til bæði hølið og hýrin inni. Halla og Fríða vóru nústaðni komnar og høvdu sett seg við hvør sínari øl hjá nøkrum havnardreingjum, tær kendu. Høvdu verið og hugt at einum filmi, tær vóru ógvuliga hugtiknar av, og sum tey øll skjótt sótu og prátaðu um. „Halla, hygg út á gólvið, heilt yvir móti vindeyganum," teskaði Fríða. Og har í trunkanum dansaði Janus; tveir ljósir knokkar tætt saman. Hon hevði væl og virðiliga fyrireikað seg til, at eina ferð fór júst hetta at henda henni, og kortini kom tað so óvæntað og var so sárt, at hon ógvaðist.

Tey hittust uttanfyri. „Halla, hetta er kona mín. Vit giftust á jólum." Hon smíltist og heilsaði teimum. „Hey og tillukku." Eyguni møttust, táttaðu. Tað bart henni fyri, sum vóru hansara líka syrgin sum hennara. „Dámar tær væl á kollegiinum?" Halla bara nikkaði. Har tosaðist onki um. Men kortini kendist lotið lýggjari hesa náttina, og myrkrið var uggandi fløtt sum ein mjúk dýna.

1988